*Framhald frá síðu 25*

57.500 kr. (2009).
Mótroknað eigur ikki at verða í allari fólkapensjónini, hetta tí at slík skipan vildi máað undir-tøkuna undan fólkapensjónsskipanini. Roknast má við at fólk, ið hava høgar inntøkur og soleiðis ikki kundu fingið nakrað fólkapensjón, um mótroknað varð í allari fólkapensjónini, ikki høvdu havt áhuga at stuðla eini almennari fólkapensjónsskipan, sum tey ikki sjálv kundu fingið lut í.

Ynskir Fíggjarmálaráðið at minka nettoinntøkuna hjá fólkapensjónistum, ið hava høga inntøku afturat fólkapensjónini, eigur slíkt inntriv at verða gjørt gjøgnum inntøkuskattaskipanina ella líknandi og ikki sum mótrokning í grundupphæddini.

**Viðv. 5)**
Arbeiðsbólkurin hjá Fíggjarmálaráðnum mælir til, at pensjónsaldurin verður hækkaður, soleiðis at landskassin fær minni útreiðslur til fólkapensjónir, og at tey eldru skulu verða longri á arbeiðs-marknaðinum.

Landsfelagið tekur fult undir við, at tey eldru skulu kunna verða longri á arbeiðsmarknað-inum, um hugur og orka er til tess. Felagið tekur tó ikki undir við, at pensjónsaldurin skal hækkast við lóg, tí Føroyar sum er hava ein tann hægsta pensjónsaldurin í heiminum.

Skulu fólk arbeiða longri, enn tey gera nú, er neyðugt at hildið verður uppat við at stoyta tey eldru av arbeiðsmarknaðinum. Landsstýrið má taka av almenna uppsagnaraldurin/70-ára frá-faringaraldurin. Neyðugt er sum skjótast at taka av almenna uppsagnaraldurin, tí tað ber ikki til at blása og hava mjøl í munninum í senn.

Um fólk kundu fingið hægri fólkapensjón við at arbeiða longri og úttsett fólkapensjónina, vildi hetta óivað verið við til at stimbra hugin at arbeiða nøkur ár út yvir vanligan pensjónsaldur (67 ár). Landsstýrið eigur at syrgja fyri at royna at minka útreiðslur til almannapensjónir við at leggja upp til, at fólk, ið arbeiða hjá tí almenna, kunnu verða í føstum starvi so leingi, orka og hugur er til tess. Í hesum sambandi eigur tað almenna at gera fleksiblar skipanir, har arbeiði og fólkapensjón kann kombinerast.

Landsfelag Pensjónista mælir til, at landsstýrið skjótast til ber ger nýskipanir á arbeiðs-marknaðarog fólkapensjónsøkinum, ið hava við sær, at fólk kunnu fara niður í arbeiðstíð, tá tey koma í 60-árini, og at starvsfólk hjá tí almenna skulu hava møguleika at verða í føstum almennum starvi so leingi, hugur og orka er til tess.

Landsfelagið mælir tískil til, at landsstýrið skjótast til ber eigur at tilevna fleksiblar skipanir, har arbeiði og fólkapensjón verða kombineráð, hetta til gagns bæði fyri tey eldru og fyri landskassan.

Fólk, ið gerast 67 ár, eiga at kunna velja at arbeiða ávikavist fulla tíð ella 2/3, 1/2 ella 1/3 tíð.

- Verður hildið áfram at arbeiða fulla tíð, fær ein ikki fólkapensjón, men útsetta fólkapensjón *bonus eigur at verða givið fyri úsetta fólkapensjón*

- Verður arbeitt 2/3 tíð eigur at verða møguligt at fáa 1/3 í fólkapensjón

- Verður arbeitt 1/2 tíð eigur at verða møguligt at fáa 1/2 í fólkapensjón

- Verður arbeitt 1/3 tíð eigur at verða møguligt at fáa 2/3 í fólkapensjón

Verður almenni fráfaringaraldurin hækkaður og broyttur á slíkan hátt, sum mælt til av Landsfelag Pensjónista, verða helst fleiri alment sett starvsfólk, ið velja at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin útyvir fylta 67. ár – og vil slík broyting somuleiðis hava við sær, at vit fáa hægri skatta-inntøkur av arbeiði, og at minni landskassaútreiðslur verða til fólkapensjónir.

Landsfelag Pensjónista mælir harumframt til, at skipanin um framskundaða fólkapensjón aftur verður sett í gildi, hetta soleiðis at fólk, ið hava nátt 55 ára aldri, og sum eru "niðurslitin" og heilsuveik kunnu fáa rætt til framskundaða fólkapensjón.

**Viðv. 6.**
Í álitinum hjá Fíggjarmálaráðnum verður mælt til, at fólkapensjónin verður hækkað við lønarvøkstrinum minus 1 %.

Landsfelagið mælir til, at fólkapensjónin á hvørjum ári verður regulerað við samlaða miðallønarvøkstrinum.

**Samandráttur:**
Landsfelag Pensjónista tekur fult undir við uppskotinum um at økja persónligu upp-sparingina komandi árini, men landið má gjalda hesa uppsparing, tá umrøður fyritíðar-pensjónistar og borgarar, sum fáa langtíðar forsorgarhjálp í sambandi við arbeiðsloysi, sjúku, barsil v.m.

Landsfelag Pensjónista mælir frá at strika grundupphæddina og mælir somuleiðis frá at mótroknað verður í fólkapensjónini frá fyrstu krónu. Heldur eigur at verða mótroknað í pensjónsfrádráttinum, tá inntøkan fer upp um 300.000 kr., soleiðis at vit fáa eina regulering av inntøkuni hjá fólkapensjónistum, ið hava høga inntøku afturat fólkapensjónini.

Landsfelag Pensjónista tekur ikki undir við at hækka almenna pensjónsaldurin við lóg, men eigur landsstýrið at syrgja fyri, at starvsfólk ikki verða diskriminerað á arbeiðsmarknaðinum, men fáa møguleika at verða verandi á almenna arbeiðsmarknaðinum so leingi, orka og hugur er til tess – hetta fyri at spara pensjónsútreiðslur og hækka lívsgóðskuna hjá eldri borgarum, ið hava hug og orku at arbeiða fulla tíð ella parttíð nøkur ár útyvir vanligan fólkapensjónsaldur (67 ára aldur), og fyri at minka um útreiðslurnar hjá landskassanum.

Fólkapensjónin eigur at verða regulerað samsvarandi samlaða meðallønarvøkstrinum.

## Fólkapensjónin og samhaldsfasti

**Gift verða diskriminerað í fólkapensjónshøpi**

Sum er verða gift fólk diskriminerað í fólkapensjónshøpi. Hetta er óskiljandi og órímiligt, tí serstakliga í føroyska samfelagnum verður hildið, at hjúnabandið er góð institutión og samfelags-skipan, sum ikki eigur at vera ein vansi – heldur ikki í pensjónshøpi.

Fólkapensjónin til gift og støk má javnstillast, og mugu gift og støk fáa somu grund-upphædd – júst sum gjørt verður í Danmark. Neyðugt er somuleiðis at broyta fólkapensjóns-reglurnar, soleiðis at einans verður tikið atlit til inntøkuna hjá pensjónistinum sjálvum og ikki sum nú, har inntøkurnar hjá báðum hjúnafeløgunum verða lagdar saman, áðrenn fólkapensjónin verður ásett.

**"Samhaldsfasti" eigur at verða styrktur**
Í núverandi samgonguskjali millum A, B og C (Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðar-flokkin) verður boðað frá, at samhaldsfasti skal styrkjast. Landsfelag Pensjónista tekur fult undir við hesi ætlan hjá ABC-samgonguni, tí hetta kundi bøtt munanadi um útgjaldið úr samhaldsfasta. Og kundu fólkapensjónistar, ið bert hava fólkapensjón og samhaldsfasta at liva av, soleiðis fingið meira pening til lívsins uppihald og kundu liva eitt virðiligt lív uttan fátækradømi. Í hesum høpi skal leggjast afturat, at topppolitikarar úr politisku flokkunum, bæði úr samgonguni og andstøðuni, í august mánaða 2008 á fundi við Landfelag Pensjónista søgdu, at útgjaldið frá samhaldsfasta beinanveg átti at hækkað í minsta lagi við 1.000 kr. um mánaðin, men gjørdist henda útmelding sum kunnugt ikki veruleiki (útgjaldið hjá samhaldsfasta hækkaði einans við 230 kr. um mánaðin hin 1. januar 2009).

Útrokningar, sum Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, gjørdi í 2007 vegna Landsfelag Pensjónista viðv. samhaldsfasta, vísa, at útgjaldið úr samhaldsfasta kundi verið væl hægri um nøkur ár, um inngjaldið til samhaldsfasta varð hækkað við ¼ % frá ávikavist arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum 4 ár á rað, t.v.s. við í alt 1 prosenti frá ávikavist arbeiðstakarum og arbeiðs-gevarum. Sambært hesum útrokningum kundi útgjaldið úr samhaldsfasta verið hækkað við 1.533 kr. um mánaðin longu í 2016 - hetta um inngjaldsprosentið varð hækkað við ¼ % í 2008, 2009, 2010 og 2011. (kelda: Sigurd Poulsen, stjóri í Landsbanka Føroya).

Landsfelag Pensjónista, ið m.a. hevur sum endamál at virka fyri at allir fólkapensjónistar skulu hava góð fíggjarlig kor, ikki minst fólkapensjónistar, ið bert hava fólkapensjón og samhaldsfasta at liva av, mælir tí til, at inngjaldið til samhaldsfasta sum skjótast verður hækkað (við ¼ % um árið í fýra ár á rað) ella tilsamans við 1% frá hvørjum parti. Slík hækking av inngjaldinum og harvið av útgjaldinum úr samhaldsfasta hevði eftir fáum árum munað væl hjá fjøld av føroyingum, tá serstak-liga hjá ófaklærdum arbeiðarum, fiskimonnum, heimaarbeiðandi kvinnum v.fl., ið ikki hava nátt ella ikki hava havt møguleika at spart upp til privata pensjón/eftirløn at tryggja sær virðilig og livilig fíggjarlig kor á eldraárum.

**Ólavsøkupakkin 2009**
Í Ólavsøkupakkanum 2009/sparipakkanum verður lagt upp til, at fólkapensjónirnar skulu skerjast við 25 mió. kr í 2010.

Verður hetta pensjónsspariuppskot framt í verki, fær hetta ómetaliga óhepnar fíggjarligar og sosialar fylgjur fyri stóran hóp av láglønтum, fátækum pensjónistum.

Av hagtølum hjá Hagstovu Føroya vita vit, at meira enn helvtin (56%) av fólkapensjónistum í Føroyum, ella í alt 3.443 fólkapensjónistar í 2008 høvdu bert ella nærum bert fólkapensjón og samhaldsfasta at liva av.

Pensjónistar, ið einans hava lága inntøku afturat pensjónini, tola ikki at missa burturav pensjónini/nettoinntøkuni. Sambært altjóðastovninum OECD (Organisation for Economic Co-operation and Development) eru pensjónirnar í Føroyum, sum er, ov lágar og lógu undir fátækramarkinum hjá OECD í 2008. Pensjónsspariuppskotið í Ólavsøkupakkanum 2009 er tískil púra burturvið og eigur at verða tikið aftur.

Landsfelag Pensjónista mælir staðiliga frá, at pensjónistar framhaldandi verða noyddir at liva undir fátækramarkinum. Hjá giftum fólkapensjónistum lá nettoinntøkan t.v.s. fólkapensjón og samhaldsfasti eftir skatt 3.504 kr. undir fátækramarkinum hjá OECD í 2008.

Í staðin fyri at skerja fólkapensjónina eigur Fíggjarmálaráðið og Løgtingið hinvegin at syrgja fyri at nettoinntøkan hjá fátækum fólkapensjónistum kemur upp á eitt sømuligt og rímuligt støði, og eiga at syrgja fyri - sum áður lovað - at útgjaldið úr samhaldsfasta sum skjótast verður hækkað.

**Landsfelag Pensjónista**

# Nýggjar bøkur frá Føroya Skúlabókagrunni

**SKÚLABØKUR**
*Tíðindaskriv*

Skúlabókagrunnurin hevur givið út dagført tilfar, 2. útgávu, til frálæru í Global Maritime Distress & Safety System, sum *Don Petersen* hevur skrivað. Tríggjar bøkur eru, GMDSS GOC- og LRC- lærubók, GMDSS SRC og ROC VHF-lærubók og Ískoyti til GMDSS GOC- og LRC- lærubók. Tilfarið er ætlað sjóvinnufrálæruni.

***GMDSS GOC- og LRC-lærubókin*** er ætlað sum frálærubók hjá teimum, sum vilja útvega sær GOC (General Operator´s Certificate), og LRC – radiopróvbrøv (Long Range Certificate) til at passa VHF-, MF-, HF-, Inmarsat og annan GMDSS radioútbúnað á skipum.

Í bókini eru t.d. litmyndir av kortum, sum vísa sjóøkini í GMDSS, ITU radioøki, Navareas (NAVTEX-sjóøki), Inmarsat fylgisveinar og útbreiðslu. Greitt yvirlit er yvir, hvussu neyðarkall verður sent og hvussu tikið verður ímóti, og hvussu bera skal at undir slíkum umstøðum.

Bókin er 130 blaðsíður og kostar 380 kr.

***Ískoyti til GMDSS GOC- og LRC- lærubók*** er ætlað sum handbók at brúka hjá næmingum til skrivligar GOC-royndir. Í bókini eru m.a. yvirlit yvir GMDSS tíddir (frekvensir), senditíðir MSI gjøgnum Inmarsat EGC-skipanina og fylgisveinanummur.

Bókin er 20 blaðsíður og kostar 80 kr.

***GMDSS SRC og ROC VHF-lærubók*** er ætlað sum frálærubók hjá teimum, sum vilja útvega sær VHF-radioprovbræv til at passa VHF-radioútbúnað umborð á bátum og skipum.

Bókin viðger reglur fyri alt vanligt radiosamskifti, samskifti yvir strandarstøðir umframt neyðsendingar, snarsendingar og trygdarsendingar.

Eisini eru litmyndir av kortum, sum vísa VHF-útbreiðsluna í Føroyum, Íslandi, Noregi, Svalbard, Svøríki og Danmark.

Bókin er 69 blaðsíður og kostar 340 kr.

Bøkurnar fáast eisini til keyps hjá Bókamiðsøluni á Hjalla.